# ítróttur

**Nr. 109 • leygardagur • 11. juni 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo**

NSÍ-TB:

## Vespurnar hvessa broddin

**Hjá runavíkingunum kann talan verða um nýtt álopspar, nú teir fyri aðru ferð í ár taka ímóti TB**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað var kanska júst dysturin í Runavík, sum av álvara fekk fólk at rokna við TB í ár. Tann dystin var NSÍ annars stórfavorittur at vinna, men TB fór suður við javnleikinum, sum eisini kundi verið ein sigur, um væl vildi til.



*Í fyrra dystinum í ár helt TB leingi fast um leiðsluna, men at enda eydnaðist tó runavíkingum at javna*

### Hvest álop

Í Runavík iðraðu tey seg tá um stigamissin. Og tó at TB alla tíðina hevur hildið fast um góðu støðuna, so er lítið at ivast í, at runavíkingarnir hesaferð vilja hava øll stigini. Ikki minst nú talan samstundis er um stevnudyst.

Millum annað skal hetta gerast við einum hvøssum álopi, og ikki kann sigast annað enn, at møguleikarnir her eru øktir síðani seinasta umfarið. Eftir at hava verið í Hollandi við nigerianska U-21 landsliðnum, er Ikechukwu Onyema nú aftur tøkur hjá vespunum, og hartil er Páll M. Joensen í - fyribils - ein mánað læntur úr HB.

Á minus-síðuni telur, at Jústines R. Hansen er leikbannaður eftir reyða kortið seinast, eins og hvørki Kári Hansen ella Gert Langgaard enn eru førir fyri at spæla.

Hjá TB er Daniel Nyarko helst einasti maður, sum ikki er klárur hesaferð. Alexandar Jovevic hevur drigist við skaðar, síðani TB seinast vitjaði í Runavík, men hann hevur helst notið gott av frívikuskiftinum, sum landsdystirnir bóru við sær.

VB-B36:

## Svangligt á Eiðinum

**Tað er toppur móti botni í Vági, tá svanga VB tekur móti B36, sum skal fylgja við í oddastríðnum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Enn eru ikki komin nøkur almenn boð úr Vági, hvussu viðurskiftini kring besta liðið verða framyvir. Tað hevur í longri tíð verið greitt, at tos hevur verið um umskipanir, og tá VB seinasta vikuskiftið leikti vinardyst móti íslendska Reynir sum part av 100 ára haldinum, var tað Dragan Kovacevic, sum hevði ábyrgdina av liðnum.

Sum skilst, so er ætlanin eisini fyribils, at tað verður Dragan, sum fer at hava ábyrgdina av liðnum komandi dystirnar, og í øllum førum stendur nýggj uppgáva fyri framman hjá VB sunnudagin.

Til dystin móti B36 hava vágbingar allar mans tøkar, og so er spurningurin, um tað hesaferð fer at eydnast betri við stigasavnanini. Í øllum førum hevur felagið nú havt tvær vikur til at klára tankarnar og tosið, sum hevur verið kring liðið, og kanska hevur hetta saman við 100 ára haldinum verið júst tað, sum hevur skula til hjá spælarunum.

Hjá B36 siga tey, at allir mans eru tøkir til dystin. Pól Thorsteinsson hevur leingi drigist við skaða í lærinum, men hann fer helst aftur at royna seg hesaferð.

Og loksins kunnu tey í B36 eisini hava brasilianska Wellington við í hópinum. Tað tók sína tíð, áðrenn innferðarloyvið hjá honum kom í rættlag, og tá hetta loksins var í lagi, gjørdi ein skaði um seg. Men alt hetta tykist nú vera í lagi, og so er spurningurin, hvørt hann fær pláss millum teir fyrstu ellivu á vøllinum.

## Dystir um vikuskiftið

**Fótbóltur**
**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 11.06 | NSÍ-TB | Páll Augustinussen |
| 12.06 | VB-B36 | Petur Reinert |
| 12.06 | ÍF-Skála | Jens Petur Brattalíð |
| 12.06 | KÍ-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 12.06 | HB-EB/S | Georg Rasmussen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 11.06 | B36-HB | Páll Augustinussen |
| 11.06 | Royn-GÍ | Jens Petur Brattalíð |
| 11.06 | AB-LÍF | Georg Rasmussen |
| 11.06 | FSV04-Sumba | Ransin N. Djurhuus |
| 11.06 | B68-B71 | Dagfinn Olsen |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | EB/S-ÍF | Anton Skoradal |
| 12.06 | VB-Fram | Lars Müller |
| 12.06 | NSÍ-SÍ | Jan Gardar |
| 12.06 | Skála-B68 | Edvard Højgaard |
| 12.06 | HB-KÍ | Jón S. Gleðisheyg |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | B36-GÍ | Ørvur á Lag |
| 12.06 | AB-EB/S | Jógvan Vest |
| 12.06 | FSV04-KÍ | Kristin av Kák |

## Johan á veg upp

**Jón Rói Jacobsen og liðfelagarnir hjá honum í Frem taptu hóskvøldið týdningarmikla slagið um uppflyting í Horsens**

DANMARK
1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Ein føroyskur landsliðsspælari umboðaði annan partin. Teir taptu, og harvið minkaði sannlíkið rættuliga nógv fyri, at hesin landsliðsspælarin, sum eitur Jón Rói Jacobsen, og felagið hjá honum, Frem, næsta kappingarár verða partur av superliguni.

Ein annar føroyskur landsliðsspælari plagar at umboða hin partin. Teir vunnu, og harvið vaks sannlíkið rættuliga nógv fyri, at hesin landsliðsspælarin, sum eitur Johan Byrial Hansen, og felagið hjá honum, Horsens, næsta kappingarár verður partur av superliguni. Johan Byrial Hansen var ikki við í sjónvarpaða toppdystinum. Hann kom ikki aftur til Danmarkar fyrrenn dystardagin, eftir at hann í eina viku hevði verið í Føroyum í landsliðsørindum.

Horsens vann 2-1. Í steðginum stóð á jøvnum 1-1, eftir at Jón Rói og liðfelagarnir hjá honum í Frem greitt høvdu verið leikliga omaná og høvdu javnað. Tíðliga í 2. hálvleiki legði Horsens seg aftur á odda, og hóast Frem royndi at leggja trýst á - eitt nú við at flyta Jón Róa Jacobsen fram í álopið - so komu ikki fleiri mál.

Harvið er Horsens á odda við 60 stigum. SønderjyskE hevur 58 stig, og Frem hevur 56 stig. Næstsíðsta umfarið verður í vikuskiftinum.

Tá hevur Horsens møguleika á Eysturbrúgv í Keypmannahavn, har Skjold verður mótstøðuliðið, at tryggja sær uppflyting í superliguna. Frem skal spæla á heimavølli ímóti longu niðurflutta B93, og Næstved, sum er í trongum skóm, skal spæla á heimavølli ímóti SønderjyskE. Vónin hjá Frem og Jón Róa Jacobsen er, at SønderjyskE skal kiksa í Næstved.

Andrew av Fløtum og liðfelagarnir hjá honum í Fremad Amager skulu spæla á heimavølli ímóti Brønshøj.